# Ársfrágreiðing 2018




SAVNS
GULL

## SavnsGull 2018

**Annika Elsa Højsted**
Skrásetari

**Bára Svabo Persson**
Skrásetari

**Bárður Hansen**
Skrásetari

**John Rimestad**
Skrásetari

**Jógvan í Toftum Olsen**
Talgildari

**Linda Mortansdóttir**
Skrásetari

**Lív Lindenskov Lützen**
Skrásetari

**Martin K. Kristiansen**
Skrásetari

**Mass Hoydal**
Verkætlanarleiðari

**Regin Davidsen**
Talgildari og skrásetari

**Uni Olsen á Skúr**
Skrásetari

## Stýrisbólkur 2018

**Annika Smith**
Stjóri á Landsbókasavninum

**Ivan Hentze Niclasen**
Stjóri í Kringvarpinum

**Jóhann Mortensen**
Tíðindafólk í Kringvarpinum

Forsíðumynd:
Høgni Heinesen, Heinesen Myndir

# Innihald


SavnsGull fer at geva nýtt innlit í føroyska søgu .......... 3
Føroya Fólks miðlasavn .......... 4
Visión og missión .......... 4
Tað veruliga gullið glitrar .......... 5
Søgugongd fyri verkætlanina .......... 6
Pappírsparturin .......... 8
Ljóðparturin .......... 10
Sjónvarpsparturin .......... 12
SavnsGull talgildar savnið hjá Føroyamálsdeildini .......... 15
SavnsGull – út til fólkið har fólkið er! .......... 16
Fíggjarliga nýtslan 2018 .......... 19




# SavnsGull fer at geva nýtt innlit í føroyska søgu

Verkætlanin “Savnsgull” er ein tann mest spennandi søguliga verkætlanin í Føroyum tey seinastu mongu árini. Arbeiðið við at talgilda alt útvarpssavnið og sjónvarpssavnið liggur í fastari legu, og væntandi verður komið endaliga á mál við arbeiðinum í 2023.

Longu nú kunnu vit siga, at hetta at søguliga útvarpstilfarið frá 1957 og frameftir, og sjónvarpstilfarið frá 1984 og frameftir verður lættari atgongt fer at geva nýtt innlit í hendingar og gerandislív í Føroyum hesi árini. Tilsamans 26.846 útvarpsbond verða talgild. Hetta eru eitt nú tíðindasendingar og mentanarsendingar í breiðastu merking. Samtíðis sum arbeitt verður við at talgilda útvarpsbondini, verða eisini tey mongu pappírsskjølini, sum útvarpsfólkini skrivaðu í samband við tíðindir og sendingar, skrásett og talgild. Hetta fer at lætta munandi um arbeiðið hjá teimum, sum skulu leita eftir tilfari í søguligu upptøkunum.

Útvið 14.000 sjónvarpsbond verða talgild. Talan er um allar sendingarnar hjá SvF, har serliga tær elstu frá áttati-árunum vóru um at forfarast við teimum gomlu U-Matic bondunum. Eisini tey umleið 3.700 rábondini úr SvF savninum eru umfatað av verkætlanini. Fotografarnir tóku hendingar og samrøður á rábond, og síðani vórðu eitt nú brot úr samrøðum og myndir kliptar til sendingar úr rábondunum. Í myndasavninum í SvF varð avrátt at goyma fleiri av rábondum, tí hildið var, at hetta vóru virðismiklar samrøður og upptøkur.

Eitt skifti var ivi um, hvørt tey mongu rábondini frá serliga áttati- og nítiárunum eisini rúmaðust í verkætlanini. Leiðarin á “Savnsgull”, Mass Hoydal arbeiddi tó fyri tí skilagóða avgerð, at eisini øll rábondini skuldu talgildast. Tá hetta arbeiðið er liðugt, kunnu eitt nú søgugranskarar og onnur fáa eitt forvitnisligt innlit í fleiri av avgerandi hendingunum í nýggjari føroyskari søgu.

“Savnsgull” fer saman við KvF at arbeiða ítøkiliga fyri at gera tilfar úr tí stóra savninum atkomuligt fyri almenninginum. Tað er er umráðandi hjá eini framkomnari tjóð at kenna sína søgu. “Savnsgull” fer at veita eitt munagott og áhugavert íkast til søgugranskingina framyvir.

**Ivan Hentze Niclasen**
*Stjóri í Kringvarpi Føroya*



# Føroya Fólks miðlasavn

Savnsgullið er eitt tilfeingi, sum kann menna okkara vitan, samleika og søgu um Føroyar og sum føroyingar.

Kringvarpssavnið goymir ein heilt serstakan og stóran part av Føroya søgu frá 6. februar 1957 og fram til dagin í dag. Í savninum er nærum alt, sum er hent í Føroyum innan øll øki, og tað er miðlað óheft.

Kringvarpssavnið fevnir um 521.179 pappírskjøl, 26.846 útvarpsbond og væl omanfyri 14.000 sjónvarpsbond. Og savnið er á goymslu í tveimum støðum: á Hjalla og í Sortudíki.

Longu undan aldaskiftinum varð tosað um, at tíðin máar tilfarið í savninum, og at okkurt mátti gerast fyri at bjarga tí. Tað hevur verið drúgført at koma so langt áleiðis at farast kundi undir arbeiðið at bjarga savninum.

Í 2014 vórðu lunnar settir undir verkætlanina, SavnsGull. Verkætlanin, sum skal bjarga savninum á tann hátt, at alt skal verða talgildað. Harumframt skal SavnsGull eisini standa fyri at geva almenninginum atgongd til tilfarið.

## Visión

Við at talgilda kringvarpssavnið skal Kringvarp Føroya verða størsta savn innan tíðindi, mentan og siðsøgu í Føroyum.

Við tíðini skal almenningurin hava atgongd til savnið, og við hesum skal Kringvarp Føroya verða fremsti mentanarberi innan økið.

SAVNSGULL

## Misión

Missiónin er at bjarga øllum tilfari í Kringvarpssavninum.

Góðskan á tilfarinum skal vera høg eins og skrásetingin.

Við hesum tilfari skal Kringvarp Føroya ríka søgu, lív og samleika føroyinga við sendingum og tænastum, sum upplýsa, menna, undirhalda og varðveita Føroya søgur.

# Tað veruliga gullið glitrar

Gull glitrar, tað er tungt, og tá ið tað er í stórum mongdum, verður tað í nógvum førum goymt væl og í tryggum umhvørvi, har flest fólk ikki sleppa til. Tá kunnu flest fólk bert droyma um tað ríkidømi, sum gullið kann hava við sær.

Orðið gull er brúkt nógv í samband við hesa verkætlan.

Kringvarpssavnið kann berast saman við tað, sum er skrivað omanfyri. Vit hava eisini eitt savn, sum er gull vert. Har er tó ein stórur munur. Gullið í Kringvarpssavninum skal ikki goymast fyri almenninginum. Gullið skal út til fólkið, har sum fólkið er! Og tá tað kemur úr til fólkið, sleppur gullið at glitra. Gullið í savninum fær okkara hugaheim og kenslulív at spretta og staðfestir, hvørji vit eru. Ein serstøk tjóð, eitt serstakt fólk – Føroyingar.

Verkætlanin er nú komin so mikið langt, at nógv av tilfarinum nú er talgildað og goymt trygt. Nú ræður um at fáa savnstilfarið út til fólkið. Hetta arbeiðið er byrjað við, at ymiskt tilfar er lagt út á almennar pallar. Í komandi tíð fara vit at arbeiða miðvíst við at fáa tilfarið í savninum út til fólkið, har fólkið er. Tað er tá, savnsgullið veruliga glitrar.

**Mass Hoydal**
*Verkætlanarleiðari fyri SavnsGull*

# Søgugongd fyri verkætlanina

Tosað varð um at bjarga útvarps- og sjónvarpssavninum, áðrenn Kringvarpið varð sett á stovn. Longu í 2002, tá Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya vóru tveir stovnar, var skriv at lesa í Dimmalætting, at nú vóru bondini um at forfarast.

Í 2010 varð í eini frágreiðing mett um savnið, m.a. varð mett um, hvat kravdist fyri at bjarga savninum: 2,7 milliónir um árið í 10 ár, sum hevði við sær, at ljóðbond og sjónvarpsbond kundu verða bjargað.

Eitt týðandi stig at bjarga tilfarinum kom undan kavi, tá ið verklagslógin at byggja út kringvarpshúsið var fyri í fíggjarnevndini í mai 2013. Fíggjarnevndin skrivar í áliti sínum, dagfest 3. mai 2013, soleiðis um bandasavnið:

*Fíggjarnevndin heldur, at nú útbyggingar verða framdar, er neyðugt samstundis at taka støðu til, hvussu bandasavnið í kringvarpinum verður varðveitt. Fíggjarnevndin heldur tí, at landsstýrismaðurin til fíggjarlógina fyri 2014 eigur at fyrireika eina skipaða gongd, so ferð verður sett á varðveitslu av bandasavninum frá 1. januar 2014. Landsstýrismaðurin eigur saman við kringvarpinum at umhugsa, um uppgávan kann bjóðast út. Eisini eigur landsstýrismaður at umhugsa, í hvønn mun uppgávan kann gerast av fólki í vardum starvi.*

Í 2013 samtykti løgtingið eina eykajáttan, sum var 800.000 kr. Játtanin varð nýtt til at fáa tól til vega at talgilda útvarpsbondini við, eins og gamlar bandmaskinur hjá útvarpinum vórðu umvældar til hetta arbeiðið. Í 2014 vórðu játtaðar 900.000 kr., so gongd kundi koma á arbeiðið at talgilda savnið. Mass Hoydal varð settur sum samskipari. Fyrsta uppgáva hansara var at fáa lýst, hvussu farast kundi til verka. Tingið játtaði eisini verkætlanini 900.000 kr. í 2015, og Mass Hoydal varð settur sum leiðari fyri SavnsGulli, sum verkætlanin varð nevnd.

Tey fyrstu árini fevndi arbeiðið um at talgilda pappírspartin og ljóðpartin. Í 2016 varð framtíðin hjá sjónvarpsbondunum greið, har A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møller Fond til almene Formaal játtaði 5 milliónir krónur.

Í 2017 kom gongd á at talgilda sjónvarpspartin; alt Kringvarpssavnið verður nú talgildað og varðveitt til komandi ættarlið.

Nú bjargingin av savninum í Kringvarpinum er komið í eina trygga legu, hevur SavnsGull eisini tikið uppgávuna á seg at talgilda bandasavnið á Føroyamálsdeildini.

Umframt at bandasavnið skal bjargast, stendur í Public service sáttmála frá 1. Januar 2017, at *Verkætlanin SavnsGull hevur til endamáls [...] at gera tilfarið atgeingiligt fyri borgaranum.* Hetta arbeiðið fer at taka dik á seg í komandi árið.





700.000
600.000
500.000
400.000
300.000
200.000
100.000
0
Jun 2014
Nov 2014
Apr 2015
Sep 2015
Feb 2016
Jul 2016
Dec 2016
May 2017
Oct 2017
Mar 2018
Aug 2018
Jan 2019
Jun 2019
Nov 2019
Apr 2020
Sep 2020
Feb 2021
Jul 2021
Dec 2021
May 2022
Oct 2022
Mar 2023
Jun 2023
Ætlan
Talgildað og skrásett



# Pappírsparturin

Tíðindaskjølini — pappírsparturin — er tann mest støðuga og samansetta eindin í kringvarpssavninum. Í hesi savnseindini eru nærum øll tíðindi goymd síðani fyrstu útvarpssendingina tann 6. februar 1957 og fram til 1996, tá pappír varð skift út við teldu. Telduskipan varð brúkt undan 1996, men tá í tíðini vórðu øll tíðindi prentað út og goymd sum skjøl. Øll hesi árini er nógv pappír savnað í goymsluni, ið telur væl omanfyri 500.000 pappírsskjøl. Nógv tann størsti parturin er tíðindi, men í savninum eru eisini skráir, veðurtíðindi, Koda-listar og annað tilfar úr útvarpinum.

Arbeitt verður fyri at fáa alt pappírssavnið skrásett, og gjørt klárt at til ber at leita og finna fram ta søgu, sum leitað verður eftir. Hetta tilfar er ein týdningarmikil partur av okkara nýggju søgu, har arbeitt verður fyri, at øll kunna fáa atgongd til tilfarið.

Við tí arbeiðsorku og áhaldni hjá starvsfólkunum í SavnsGulli, er væl komið burturúr. Sum sæst á myndini av arbeiðinum við pappírspartinum, eru vit júst farin fram um helvtina í 2018 av tí, sum skal talgildast og skrásetast.



30000
25000
20000
15000
10000
5000
0
Jun 2014
Dec 2014
Jun 2015
Dec 2015
Jun 2016
Dec 2016
Jun 2017
Dec 2017
Jun 2018
Dec 2018
Jun 2019
Dec 2019
Jun 2020
Dec 2020
Ætlan talgildað – *SavnsGull*
Talgildað – *SavnsGull*
Ætlan talgildað – *Fróðskaparsetrið*
Talgildað – *Fróðskaparsetrið*

# Ljóðparturin

Útvarpsbondini goyma nógvar ymiskar sendingar, eitt nú frásagnir, reportasjur, fyrilestrar, barnaútvarp og mangt annað. Í savninum eru 26.846 bond. Tað fyrsta er frá 6. februar 1957, tá útvarpið sendi fyri fyrstu ferð. Í 2001 varð seinasta ljóðbandið nýtt í Útvarpi Føroya, og síðani er alt tikið upp á teldu og talgildað.

Arbeiðið gongur væl. Í seinastu helvt av 2018 hevur verið arbeitt við at talgilda bond, ið eru sera long, og tí er nøgdin av bondum, sum skuldu talgildast, ikki rokkið í 2018. Ein partur av arbeiðinum er eisini at skráseta tað, sum gjørt er, og at kanna, hvussu væl tilfarið í Kringvarpssavninum er skrásett. Hetta arbeiðið er farið í gongd, og við tí arbeiðsorku, sum er í SavnsGulli, er væl komið burturúr.

Tað er eisini týdningarmikið, at fólkið fær atgongd til tilfarið, soleiðis at hetta kann koma okkum øllum til góðar. Í næstum verður farið undir at kanna, hvussu tilfarið kann koma okkum øllum til góðar á besta hátt.


Sjónvarpssavnið er skjótt bjargað!
U-Matic bond eru nú talgildað og
bjargað til eftirtíðina. Skjótt er bert
Betacam bond eftir at bjarga.



# Sjónvarpsparturin

Sjónvarpið varð alment sett á stovn 1. apríl 1984, og sjónvarpsbondini eru omanfyri 14.000 í talið. Talan er um fleiri ymisk sløg av bondum, ið krevja ymiskar førleikar og útgerð, ið eru ring at fáa hendur á.

Í 2016 kom stuðul frá A. P. Møller Fonden uppá 5 milliónir krónur. Við hesari upphæddini verður møguligt at talgilda øll bond, sum eru í varðveitslu í Kringvarpssavninum.

Nú tvey ár eru liðin, síðani vit fóru undir at talgilda og bjarga sjónvarpspartinum, er nógv komið burturúr. U-Maticbondini, sum eru tey, ið eru ringast fyri, eru nú bjargað. Nógv varð gjørt burturúr at finna bestu fyritøkur, ið kundu talgilda okkara mentanararv. Memnon vann eitt útboð, og hereftir varð farið undir at fáa bondini til Belgia, har fyritøkan heldur til. Vænta varð, at vit fóru at fáa bjarga 90% av U-Matic bondunum. Nú arbeiðið er liðugt, kunna vit gleðast um, at 96% av tilfarinum er bjargað, talgildað og varðveitt til eftirtíðina.

Nú er farið undir at bjarga bond av slagnum BetaCam. Í komandi árið fara vit at koyra bondini av landinum, har øll BetaCam bond verða talgildað av somu fyritøku, sum talgildaði U-Maticbondini. Væntandi verður hetta liðugt, bjargað og talgildað í 2020. Tann største parturin av sjónvarpssavninum eru DV25-bondini, ið vera talgildað innan karmarnar hjá Kringvarpinum.



# SavnsGull talgildar savnið hjá Føroyamálsdeildini



Á summarið 2017 varð skrivað undir avtalu millum SavnsGull og Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum. SavnsGull stendur fyri at talgilda spolabond hjá Føroyamálsdeildini, ið eru varðveitt í savninum hjá Føroyamálsdeildini. Hetta eru ljóðbond, har tey flestu eru av sama bandaslagi sum ljóðbondini í Kringvarpssavninum. SavnsGull havur tí vitan, tøkni og maskinur, ið megna at talgilda hendan dýrgrip.

Í savninum hjá Føroyamálsdeildini eru uml. 2.500 spolabond. Á flestu bondunum eru gamlar upptøkur við føroyingum, sum kvøða, syngja og siga frá frásagnum um staðarnøvn, trúgv, siðir o.s.fr. Mortan Nolsøe (1924-87), professari, hevði nógv av bondunum við sær, tá hann kom á Føroyamálsdeildina at arbeiða í 1973. Tað varð byrjanin á hesum savnið. Síðani kom ein rúgva av bondum afturat umframt upptøkur frá Dansk Folkemindesamling. Eins og savnið í Kringvarpinum hevur stóran týdning fyri eftirtíðina, hevur savnið á Føroyamálsdeildini upptøkur við fólki, sum fortelja frá hendingum og øðrum, ið sigur frá, hvørji vit eru sum føroyingar. Eitt savn, sum er gull vert fyri eftirtíðina, og tað gleðir okkum, at vit kunna arbeiða saman við Føroya Fróðskaparsetur at varðveita henda skatt.

Arbeiðið at talgilda hesi bond er farið av bakkastokki, og arbeiðið gongur sum ætlað. Um 800 bond eru talgildað, ið nú eru varðveitt til eftirtíðini á tryggan hátt. Um alt gongur sum væntað, er hetta arbeiðið komið á mál í 2019.

Vit kunna øll gleðast um, at Føroyamálsdeildin er farið undir at geva almenninginum atgongd til tilfarið.




**Søvnini í Kambsdali**

Erling Kjærbo, Helgi Dahl Michelsen, Mass Hoydal, Tóta Árnadóttir, Sámal Tróndur Johansen

**Søvnini í Suðuroy**

Mass Hoydal, SavnsGull, greiðir Miðnámsskúlanum í Suðuroy frá hvussu gongur við verkætlanini, og hvønn týdning hetta kann fáa, fyri teirra undirvísing



# Føroya søga talgild – Út til fólkið, har fólkið er

Tað er ikki bert í SavnsGulli, at Føroya søga verður talgildað og varðveitt fyri eftirtíðina. Eins og skrivað er í hesari ársfrágreiðing, er arbeiðið at talgilda og varðveita savnið á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum væl ávegis. Harumframt verður Føroya søga talgildað á Landsbókasavninum, Tjóðsavninum og Landsskjalasavninum.

Í 2018 varð tátturin tikin uppaftur, har søvnini fóru runt Føroyaland at kunna um tað arbeiðið, sum verður gjørt, og ikki minst at greiða frá, hvussu hetta kann koma okkum øllum til góðar. Farið varð runt landið at vitja Miðnámsskúlar. Bæði lærarar og næmingar vístu stóran áhuga, og lunnar blivu lagdir undir, at ungdómurin kann brúka tað tilfar, vit øll eiga.

Fólk kring knøttin hava sýnt áhuga fyri Facebook-síðuni, har SavnsGull hevur lagt brot og annað út. Av tilfarinum á Facebook er tað serliga brot úr nýliga talgildaða sjónvarpssavninum, sum nógv hava fegnast um at síggja.



KRINGVARP FØROYA

| **Útreiðslur** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---:|---:|---:|
| Lønir v.m. | 253.283 kr. | 467.089 kr. | 316.591 kr. |
| Keyp av vørum og tænastum | 11.779 kr. | 9.699 kr. | 9.080 kr. |
| Keyp av útbúnaði | 60.597 kr. | 43.451 kr. | 36.800 kr. |
| **Tilsamans** | **325.659 kr.** | **520.239 kr.** | **362.471 kr.** |



# Fíggjarliga nýtslan 2018

Arbeiðið at bjarga Kringvarps-savninum verður fíggjað við játtan á fíggjarlógini og uttanhýsis fígging frá A. P. Møller Fonden. Á hvørjum ári hevur fíggingin frá tí almenna verið nýtt til at talgilda og skráseta útvarpspartin, sum fevnir um pappírstíðindini og ljóðpartin. Fíggingin frá A. P. Møller Fonden hevur verið brúktur til at talgilda tann eldra partin av sjónvarpsbondunum.

SAVNSGULL

| **Útreiðslur** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---:|---:|---:|
| Lønir v.m. | 822.091 kr. | 1.178.847 kr. | 1.245.259 kr. |
| Keyp av vørum og tænastum | 59.824 kr. | 323.652 kr. | 740.956 kr. |
| Keyp av útbúnaði | 6.503 kr. | 58.686 kr. | 30.484 kr. |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 10.793 kr. | 15.600 kr. | 22.496 kr. |
| **Tilsamans** | **899.212 kr.** | **1.576.785 kr.** | **2.039.195 kr.** |

| **Inntøkur** | | | |
|---|---:|---:|---:|
| Søla av tænastum | | 100.060 kr. | 102.060 kr. |
| Flytingarinntøka | | 584.421 kr. | 1.037.596 kr. |
| **Tilsamans** | | **684.481 kr.** | **1.139.656 kr.** |

*A. P. Møller og Hustru*
*Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

KRINGVARP FØROYA

SavnsGull — Kringvarp Føroya — Postsmoga 1299 — Norðari Ringvegur 20 — 100 Tórshavn